Inntøkur av FAS-skipanini

Hans Ellefsen, búskaparfrøðingur, 17. mai 2016

Niðurstøða

Niðurstøðan í hesum riti er, at tann føroyska FAS-skipanin í 2014 gav tí almenna góðar 60 mió. kr. í eykainntøku, í mun til um eingin FAS-skipan var. Niðurstøðan er eisini, at FAS-skipanin tilsamans fyllir umleið 5 % av heildarbúskapinum. Greitt er, at nógv fleiri inntøkur kunnu vinnast burtur úr FAS-skipanini. Samanumtikið ber til at siga:

- FAS skapar tí føroyska landskassanum munandi inntøkur
- FAS skapar inntøkur, sum tann føroyski landskassin annars ikki hevði fingið
- FAS er ein skipan í kapping – menningarmøguleikar eru
- FAS skapar arbeiðspláss við høgari spesialisering
- Stórur vøkstur síðan 2011 – men vøksturin er minkaður tey seinnu árini
- Økt avleitt virksemi síðan 2009
- FAS er ein fongur fyri tað føroyska samfelagið – og kundi verið enn betri

Bakgrund

Í áttatiárunum vórðu nógv skip í shippingvinnuni útflaggað til sokallað hentleikafløgg, har skatturin var lítil og eingin. Fyri at forða fyri hesum stovnaðu fleiri lond í Vesturheiminum altjóða skipaskrásetingar. Eitt nú vórðu DIS og NIS stovnaðar í ávikavist Danmark og Noregi seinast í áttatiárunum. Við hesum tiltaki eydnaðist í stóran mun at fáa skipini, sum vóru í teimum heimligu flotunum, at verða verandi í heimlandinum. Fyrst í nítiárunum fingu vit eisini eina føroyska altjóða skipaskráseting, kallað FAS (Føroya Altjóða Skipaskráseting). Hugskotið aftan fyri at gera eina føroyska altjóða skipaskráseting var at fáa tey føroysku skipini í hesi vinnu í eina heimliga skipan umframt at draga útlendsk reiðarí at Føroyum. Harvið kundi eisini eitt umhvørvi rundan um eina shippingvinnu verða skapt í Føroyum. Tann føroyska FAS-skipanin er eitt alternativ til DIS- og NIS-skipanirnar.

Áður hevur verið staðfest, at einir 1000 føroyingar sigla undir annaðhvørt DIS, NIS ella FAS (kelda: Granskingardepilin fyri økismenning og útrokning). Hetta varð roknað í 2009, og talið er vaksið síðan tá. Vit meta, at í 2014 eru einir 1500 føroyingar við eini skipan, sum minnir um FAS.

Niðanfyri er endurgivið úr búskaparráðsfrágreiðingini frá vári 2016. Her eru uttanlandsinntøkurnar lýstar við tveimum talvum:

Talvurnar niðanfyri við talupplýsingum frá TAKS[1] lýsa annars á ein eitt sindur øðrvísi hátt arbeiðsvirknið í útlondum hjá fastbúgvandi í Føroyum. M.a. geva tær eina eitt sindur øðrvísi lýsing av nýtsluni av DIS og FAS og skipanum, sum minna um hesar. Tølini í talvu II 7 niðanfyri eru ikki samantald, av tí at sami persónur kann verða taldur við í meira enn einum av bólkunum, og av tí at tølini eisini fevna um útlendingar undir FAS-skipanini. Hesi tølini frá TAKS fevna um allar arbeiðsbólkar og eru ikki avmarkað til aldurin 18-66 ár. Hetta avmarkar møguleikarnar at sammeta við tey fyrru tølini.

Talva II 7 Tal av fólki í FAS og ymsum útlendskum skattaskipanum og serskattaskipanum

	2011	2012	2013	2014
Føroyingar við FAS-skrásettum skipum	644	709	748	689
Útlendingar við FAS-skrásettum skipum	-	1373	1409	1474
Føroyingar við DIS-skrásettum skipum	403	353	343	330
Føroyingar við NIS-NOR-skrásettum skipum	-	365	414	413
Føroyingar, ið arbeiddu á landi í Noregi	-	276	357	372
Føroyingar við útlendskum fiskiskipum	415	369	469	435
Eftir § 25 b (ikki fiskiskip, innih. broytt í 2013)	-	-	672	688
Arbeiða á landi	269	390	564	548
Sigla við brunnbátum	30	36	55	61

Tølini í talvu II 8 niðanfyri frá TAKS fevna um endalíkningina fyri allar útlendskar inntøkur og allar inntøkur samanlagt. Talvan vísir, at í 2014 fevndu uttanlandsinntøkurnar um 9,2 % av øllum skattskyldugum ella álíknaðum inntøkum[2].

Talva II 8 Endaálíkning fyri skattakotur við uttanlandsinntøkum og fyri allar skattakotur

(mió kr)		2010	2011	2012	2013	2014
199	Sjómansinntøka (bara DIS)	173	165	152	138	136
271	Lønarinntøka á landi	31	77	128	192	178
274	Eftirlønarinntøka (ikki kapitalpens.)	19	39	43	45	48
279	Inntøka skip (brunnbátar)	7	15	18	28	31
282	25 a veiðuinntøka (fiskiveiða)	241	278	288	132	137
283	25 b inntøka á sjónum, farmaskip o.til.	171	216	278	464	474
	Aðrar kotur fyri uttanlandsinnt.	9	12	3	6	6
	Samanlagt mió. kr.	651	802	910	1005	1010
	Endaálíkning fyri allar skattakotur:					
	Upphædd í mió. kr., øll álíkning	9427	9736	10265	10583	11007
	Uttanlandsupph. í % av allari álíkn.	6,9 %	8,2 %	8,9 %	9,5 %	9,2 %

Av tí at so nógvir føroyingar sigla við altjóða handilsskipum, hava vit stóra vitan um júst hesa vinnu. Tí er tað natúrligt, at føroyingar royna at troyta teir møguleikar, sum eru í eini tílíkari skipan.

Gongdin tey seinastu árini hevur verið ein minkandi vøkstur. Tann stóri vøksturin var serliga árini 2010-2012. Mynd 1 vísir gongdina í talinum av skrásettum skipum. Vøksturin stavar serliga frá útlendskum reiðaríum. Hjá teimum útlendsku skipunum eru eigararnir úr Norðurlondunum Svøríki, Noregi, Íslandi og Danmark. Hetta kemst m.a. av, at føroyingar hava góðar avtalur um flutning og skatt (cabotaguavtalur og dupultskattaavtalur) við hesi lond. Í 2010 varð sett sum mál at røkka 100

[1] Upplýsingar givnir Búskaparráðnum 14. Desember 2015.
[2] Tað henda javnan dagføringar av endaskránni. Tølini fyri 2014 eru frá februar 2016.

skipum í FAS-skipaskránni í 2011 (Sjóvinnupolitikkur, 2010). Hetta málið er ikki rokkið enn. Tað tykist, sum størri dentur skal leggjast á at selja skipanina í øðrum londum, um talan skal verða um størri vøkstur.

Mynd 1 Tal av skipum í FAS-skipanini



Tá ið mett verður um tann búskaparliga ágóðan, verður eisini hugt at, hvørjar inntøkur talan er um, og hvørjar beinleiðis útreiðslur eru knýttar at hesum. Tað er ikki búskaparliga optimalt, um skipanin bindur arbeiðsmegi ella annað. FAS-skipanin gevur landinum inntøkur, sum landið annars ikki hevði fingið, og tryggjar harumframt, at eitt stórt tal av fólki við longri útbúgving kemur í samband við tann føroyska landskassan.

Skal tann føroyska FAS-skipanin vera kappingarfør, krevst fyrst og fremst, at útreiðslurnar av at vera í skipanini eru kappingarførar við aðrar skipanir, serliga tær í hinum Norðurlondunum. Hetta nýtist ikki at merkja, at eingin inntøka liggur eftir í Føroyum. Hyggja vit nærri at tølunum, síggja vit, at væl av inntøku hóast alt er av skipanini. FAS-skipanin er, eins so skipanirnar DIS og NIS, stovnað við tí fyri eyga, at nakrar inntøkur hóast alt skulu vera eftir í tí samfelag, sum byrjar skipanina. Niðanfyri síggja vit, at tað føroyska samfelagið fær meira burtur úr eini føroyskari FAS-skipan enn um somu føroyingarnir sigldu við DIS ella NIS. Umframt tær beinleiðis útreiðslurnar av at vera í FAS gera eisini onnur viðurskifti seg galdandi, tá ið metast skal, um eitt reiðarí skal flagga inn í FAS-skipanina. Her er týdningarmikið, at karmarnir er støðugir, og tað kunnu vit siga, at teir hava verið í Føroyum tey seinastu árini. Føroyar hava í dag tað umdømið. Eitt umdømi, sum tað tekur langa tíð at byggja upp.

Inntøkur av FAS hjá tí almenna

FAS-skipanin virkar á tann hátt, at øll sjófólk í skipanini gjalda fast 35 % í skatti (bruttoskattur), og hesar pengarnar fær reiðaríið aftur frá landskassanum. Sostatt kostar skipanin einki í útreiðslum fyri landskassan, men gevur heldur ikki inntøku frá inntøkuskatti.

Fyri at verða skrásett í FAS skulu feløgini seta á stovn eitt føroyskt partafelag, sum er vanliga skattskyldugt í Føroyum. Sostatt fær landskassin partafelagsskatt, sum er 18 % sum hjá øllum øðrum føroyskum fyritøkum. Hesi partafeløgini kunnu í staðin fyri vanligan partafelagsskatt eisini velja at

gjalda burðarorkuskatt, sum verður ásettur í mun til, hvussu stórt skipið er. Fyritøkur skulu velja fyri eitt áramál í senn, hvussu tær vilja gjalda sín skatt, men tað sæst ikki á roknskapinum, hvørt talan er um partafelagsskatt ella burðarorkuskatt. Uttan FAS-skipanina var henda skattainntøkan av ongum.

Útrokningar

Í mun til DIS og NIS fær tað almenna arbeiðsmarknaðargjøld sum inntøku av føroyingum í FAS, t.e. gjøld til ALS, AMEG og barsilsgrunnin. Bæði teir føroysku sjómenninir, sum sigla við FAS-skipum, og arbeiðsgevarin skulu gjalda hesi avgjøld. Í alt er talan um 3,62 % (ALS 1,25 % + AMEG 1,75 %[3] + barsilsgjald 0,62%) fyri bæði arbeiðsgevaran og arbeiðstakaran. Hiðani stava sostatt 7,2 % av teimum samlaðu lønargjaldingunum, sum koma til Føroya. Útlendingar, sum sigla við skipum skrásettum í FAS gjalda tó ikki hesa upphædd.

Sambært TAKS vórðu 605 mió. kr. rindaðar í FAS-lønum í 2014 (tøl fyri 2015 eru ikki tøk enn). Av hesum vórðu 247 mió. kr. rindaðar føroyingum og 358 mió. kr. útlendingum. Ein útlendingur er at skilja sum ein, sum ikki hevur fulla skattskyldu í Føroyum. Tað almenna fær sostatt 17,7 mió. kr. frá føroyingum, sum eru undir FAS-skipanini (7,2 % av 247 mió. kr.). Hesir pengarnir enda í teimum almennu kassunum, av tí at vit hava FAS-skipanina, og høvdu ikki endað har, um somu føroyingar sigldu undir t.d. DIS-skipanini ella øðrum skipanum.

Sjálv FAS-skipanin hevur eisini gjøld. Tað fyrsta árið eitt skrásetingargjald og síðani føst gjøld hvørt ár. Tey føstu gjøldini fyri at vera skrásettur í FAS-skipanini svara til í alt 2,74 mió. kr. um árið við teimum 90 skipunum, sum í dag eru skrásett í FAS. Hvørt ár eru nakrar nýggjar skrásetingar, sum eisini áttu at talt við.

Inntøkur hjá tí almenna frá skipum	2014
Mettur partafelagsskattur	8,4 mió. kr
Skrásetingargjøld	2,7 mió. kr
Arbeiðsmarknaðargjøld	17,7 mió. kr
Í alt	**28,8 mió. kr.**

Avleitt virksemi

Búskaparfrøðingar eru ikki altíð á einum máli um spurningin um avleitt virksemi. Ivamálið snýr seg serliga um, hvørt arbeiðsmegin hevði leitað sær aðrastaðni heldur, og vit tí ikki kunnu tosa um avleitt virksemi. Men tað er eyðsæð, at FAS-skipanin kastar virksemi av sær, og hon skapar eisini nakrar altjóða eftirspurdar førleikar í fleiri liðum. Hóast vit ikki altíð kunnu máta avleitt virksemi, meta vit greitt, at í hesum førinum ber at siga, at:

- Nógv annað virksemi hongur uppi í FAS-skipanini.
- Tey útlendsku reiðaríini hava eitt føroyskt partafelag, stovnað í Føroyum.
- Hetta krevur føroyskan bústað
- Umboð í Føroyum verður ofta valt
- Hetta umboðsfelag hevur ofta eisini bókingar av manningarlønum um hendi, sum skulu ígjøgnum ein føroyskan banka

[3] Hetta er hækkað til 2,25% í 2016.

Tað eru feløg í Føroyum, sum nærum burturav liva av umboðanarvirksemi. Tór-shipping og shipping.fo eru dømi um slík feløg.

Mett verður eisini, at eini fimm ársverk hjá advokatum og grannskoðarum eru knýtt at FAS-skipanini í sambandi við, at skipini skulu skrásetast og roknskapir gerast.

Vinnuhúsið gjørdi fyri felagið Farmaskip

eina kanning millum teir limir, sum í heilt stóran mun eru partur av FAS-skipanini. Kanningin styrkir fatanina, at tað samlaða avleidda virksemið er munandi størri enn tað beinleiðis avleidda virksemið við skeiðum og øðrum og lønum haðani. Feløgini verða knýtt at føroyskum ráðgevum og tænastuveitarum og skapa vitanararbeiðspláss. Yvirhøvur bendir nógv á økt avleitt virksemi tey seinnu árini.

Hyggja vit at teimum føroysku feløgunum, sum eru í FAS, so eru tey størstu Smyril-Line, Thor og Skansi Offshore. Harumframt hava Samskip eitt stórt kontór í Føroyum.

Høvdu vit ikki FAS-skipanina, er sannlíkt, at høvuðskontórið hjá hesum feløgum hevði verið flutt til landið, har tann altjóða skipaskrásetingin er, t.d. til Danmarkar, um talan var um DIS, tí tað er eitt krav í tí skipanini. Á landi arbeiða umleið 65 fólk í teimum nevndu feløgum við aktiviteti, sum hevur við FAS-skipini at gera.

Harumframt fáa aðrir veitarar, sum eitt nú veita sjófólki skeið, inntøku av FAS-skipanini. Her er helst talan um tvey ársverk ella eina góða millión krónur í inntøku.

Í talvuni eru tølini omanfyri samlað:

Virksemi á landi í Føroyum	**Lønir í alt**	**Skattainntøka**
Umboðanarvirksemi	20 ársverk = 10 mió.kr.	40 % skatt = 4 mió. kr.
Grannskoðarar og advokatar	6 ársverk = 4 mió. kr.	40 % skatt = 1,6 mió. kr.
Shippingfeløg í Føroyum	80 ársverk = 50 mió. kr.	40 % skatt = 20 mió. kr.
Skeiðsvirksemi	2 ársverk = 1 mió.kr.	40 % skatt = 0,4 mió. kr.
Í alt	**65 mió. kr.**	**26 mió. kr.**

40 % í skatti er nakað høgt sett, men hinvegin er ikki mett um, hvussu stórar inntøkurnar til tað almenna eru av avgjøldum, eitt nú mvg og skrásetingargjøldum o.ø..

Vit hava ikki tikið Eimskip/Skipafelagið við í roknistykkið, tí teirra skip eru ikki í FAS-skipanini. Men her arbeiða eini 60 fólk við shippingvirksemi á landi.

Umframt hetta kastar FAS-skipanin eisini annað virksemi av sær. FAS metir, at øll tey útlendsku reiðaríini í FAS koma til Føroya í minsta lagi eina ferð um árið (oftast fleiri persónar fyri hvørja ferð). Tann samlaða nýtslan hjá hesum fólkum til flogferðaseðil, gisting o.a. verður mett vera 10.000 kr. fyri hvørja ferð ella 1 mió. kr. í alt.

Føroyskir peningastovnar og tryggingarfelag fáa eisini inntøkur. Fyri at fáa endurgjald krevst, at reiðaríini stovna eina føroyska konto, og á henda hátt fáa føroyskir bankar eisini eina inntøku. Tað er eisini eitt krav, at arbeiðsskaðatryggingarnar eru føroyskar. Samanlagt er helst talan um einar 8-10 mió. kr. í inntøku til tann føroyska fíggjarsektorin. Og tølini eru vaksandi.

Ferðavinna og fíggjarsektorurin góvu sostatt 10 mió. kr., t.e. 5 mió. kr. til tað almenna. Um hetta eru tær avleiddu effektirnar av FAS-skipanini, eru tølini helst ikki yvirmett.

Avrundað gav FAS-skipanin tí almenna góðar 29 + 26 + 5 = 60 mió kr. í 2014, tá ið avleitt virksemi verður talt við. Hetta sæst á mynd 2 niðanfyri. Hetta er, sum nevnt, roknað í mun til, um FAS-skipanin varð avtikin og skipini vórðu útflaggað til aðrar skipanir, t.d. DIS og NIS. Fortreytin er so, at roknað verður við, at føroyingar, sum sigldu við FAS-skipunum, høvdu hildið fram at búgva og brúka pengar í Føroyum (og tað almenna sostatt hevði fingið líka nógv av MVG og øðrum avgjøldum frá teimum).

Mynd 2 Inntøkur hjá tí almenna av FAS 2014 (mió. kr.)



Hvussu stór er virðisøkingin?

Skulu vit geva eina mynd av, hvussu stór FAS-skipanin er í tí føroyska samfelagnum, mugu vit hyggja at virðisøkingini. Sum sagt, so er gott helvtin av skipunum í FAS føroysk, í tann mun eigararnir eru føroyingar. Hin helvtin er útlendsk, í tann mun eigararnir eru útlendingar. Í FAS krevst, at felagið er føroyskt, men eigararnir og nevndin kunnu vera útlendsk.

Skulu vit gera virðisøkingina upp, mugu vit vita, um manningin er føroysk ella útlendsk. Tað er bara, tá ið føroyingar eiga skipið og føroyingar sigla við, at talan er um virðisøking til tað føroyska samfelagið. Tá ið føroyingar sigla við útlendskum skipum, er bara talan um eina inntøku á gjaldsjavnanum, og ein útlendingur við einum føroyskum skipi er ein útreiðsla á gjaldsjavnanum. Hinvegin hava útlendingar við útlendskum skipum einki við tann føroyska búskapin at gera í tjóðarroknskaparligum høpi. Tað almenna fær tó inntøkur av teirra virksemi (partafelagskatt), sum bara verða roknaðar sum inntøkur á gjaldsjavnanum.

Vit kunnu stórt sæð rokna virðisøkingina sum lønarinntøkur pluss yvirskot. Sum sagt, so vóru lønargjaldingarnar í 2014 umleið 600 mió kr. sambært TAKS. Yvirskotið er helst ikki so stórt, men eitt nú Smyril Line hevði einar 30 mió. kr. í yvirskoti fyri skatt. Tilsamans verður roknað við, at talan er um eitt yvirskot á 50 mió. kr. fyri skip í FAS-skipanini í 2014.

Sostatt kundi virðisøkingin hjá skipum í FAS-skipanini verið mett at vera umleið 650 mió. kr.. Hetta svarar til góð 5 % av tí samlaðu virðisøkingini í tí føroyska samfelagnum í 2013, sum var 13 mia. kr. (www.hagstova.fo). Men sum sagt, so eru hesar 650 mió. kr. ikki tann veruliga virðisøkingin, tí nakrir eigarar eru útlendingar. Men tær 650 mió. kr. vísa støddarlutfallið í mun til tann føroyska búskapin. Hinvegin, so eru tær avleiddu vinnurnar, sum vit hava skrivað um omanfyri ikki taldar við. Vit kunnu samanbera tey 5 % hjá FAS við, at tilfeingisvinnur (fiskiveiða og alivinna) fyltu uml. 17 % av tí føroyska búskapinum í 2013.

Framtíðin og møguleikar

Sum sagt, so eru í dag 90 skip í FAS-skipanini. Málið hjá FAS var, sum sagt, at 200 skip skulu vera í skipanini við árslok 2018.

Um hetta málið verður rokkið veldst um fleiri viðurskifti. Generelt kunnu vit tó siga, at jú fleiri skip koma inn í skipanina, jú størri vinning fær tað føroyska samfelagið, uttan at tað kostar nevningarvert eyka. Sostatt hevði inntøkan væntandi verið meira enn tvær ferðir so stór, um tvær ferðir so nógv skip vóru í skipanini. Men hetta veldst eitt sindur um, hvat tað eru fyri skip, sum koma inn, t.e. um tað eru føroyingar ella útlendingar, sum eiga tey.

Sambært TAKS vóru 1.474 útlendingar og 689 føroyingar lønartakarar gjøgnum FAS-skipanina í 2014. Hesin bólkurin við 2.163 fólkum í 2014 hevur ein týðandi leiklut í Føroyum. Eftir okkara tykki eigur kjakið nú at snúgva seg um hesi viðurskifti:

- Kunnu vit fáa fleiri inntøkur burtur úr verandi reiðaríum og manning?
- Er FAS-skipanin veruliga kappingarfør?
- Hvat krevst fyri at marknaðarføra FAS í størri mun?

Keldur

Búskaparráðsfrágreiðingin frá vári 2016

'Føroysk sjófólk, sum sigla í øðrum londum', Granskingardepilin fyri økismenning, 2009

'Sjóvinnupolitikkur, uppskot og tilmæli', Vinnumálaráðið (www.vmr.fo), juli 2010

Samrøða við FAS-skrivstovuna

Tøl frá TAKS um lønarútgjaldingar undir FAS-skipanini

Roknskapir frá Skráseting Føroya hjá feløgum í FAS-skipanini

Vinnuhúsið